**Erling Eidesgaard**
**Magnus Rasmussen**
**Árni Skaale**
**Frimodt Rasmussen**
**Liljan Weihe**
**Johan Dahl**
**løgtingsfólk**

**Broytingaruppskot**

**til**

**3. viðgerð av**

**Løgtingsmáli nr. 66/2025: Uppskot til løgtingslóg um fyrireiking, prosjektering og útboð av Suðuroyartunlinum við tilhoyrandi tunnilskervum og vegakervum**

**b r o y t i n g a r u p p s k o t**

**1.** § 3, stk. 1 verður orðað soleiðis:

“P/F Suðuroyartunnilin fyrireikar, prosjekterar og letur í útboð hesar verkætlanir:

1) Farleið frá verandi vegi í Traðardali, eysturum Sandsvatn við vegum og møguligum tunli undir Traðarhamri, til undirsjóvartunnilin í Djúpadali, við íbinding í verandi vegir til Skálavíkar og Skarvanes,
2) undirsjóvartunnil við koyribreyt suður og norður í sama bergholi frá Djúpadali til Sandvíkar, við atknýttum atkomutunli frá Suðuroyartunlinum til Skúvoyar,
3) farleið frá verandi vegi í Traðardali til undirsjóvartunnilin norðan fyri Sands bygd,
4) undirsjóvartunnil við koyribreyt suður og norður í sama bergholi av Sandi til Sandvíkar, við atknýttum tunli við koyribreyt báðar vegir upp til Skúvoyar frá Suðuroyartunlinum,
5) veg millum undirsjóvartunnilin í Sandvík og nýggja Sandvíkartunnilin við íbinding í verandi veg í Sandvík,
6) tunnil úr Sandvík til Hvalbiar, og
7) veg millum nýggja Sandvíkartunnilin og landsvegin frá Hvalbiartunlinum.”

**2.** Í § 3, stk. 2 verður “linjuføringar sbrt. stk. 1, nr. 1, 3 og 5” broytt til: “linjuføringar sbrt. stk. 1, nr. 1, 3, 5 og 7”

**3.** Í § 5, stk. 1 verður “sum nevndir eru í § 3, stk. 1, nr. 1 og 3-5” broytt til: “sum nevndir eru í § 3, stk. 1, nr. 1 og 3 og 5–7”.

**4.** Í § 6, stk. 1 verður “Suðuroyartunnilin, sbr. § 3, stk. 1, nr. 2” broytt til: “Suðuroyartunnilin, sbr. § 3, stk. 1, nr. 2 og 4”.

**5.** Í § 8, stk. 5 verður “sbrt. § 3, stk. 1, nr. 2” broytt til: “sbrt. § 3, stk. 1, nr. 2 og 4”.

**Viðmerkingar:**

Ásannandi at uppskotið hjá einum minniluta í Fíggjarnevndini, Magnusi Rasmussen, um at fyrireika, prosjektera og útbjóða ta alternativu linjuføringina, av Sandi til Sandvíkar, fall við aðru viðgerð, verður, í eini roynd at røkka einari semju um fyrireikingarnar av hesi stóru verkætlan, skotið upp at fyrireika, prosjektera og útbjóða báðar linjuføringar.

Tað eru nógv viðurskifti, sum tala fyri, at tann alternativa linjuføringin er tann betra. Hon er eftir øllum at døma bíligari, hon er ein skjótari og høgligari farleið og hevur samanumtikið eina hægri samfelagsnyttu. Hesi viðurskifti verða viðgjørd niðanfyri.

Tunnilsfelagið metir, at meirkostnaðurin av at projektera báðar farleiðir verður uml. 20-25 mió. kr. Norconsult tekur sær av projektering fyri P/F Suðuroyartunnilin. Fyri ikki at seinka hesi tilgongd, kundi alternativa linjuføringin hóskandi verið boðin út til føroyskar veitarar.

Havandi í huga, at kostnaðarmetingin av Suðuroyartunlinum í løtuni er uml. 5 milliardir, eru 20-25 mió. ein lutfalsliga lítil upphædd at brúka uppá at fáa projekterað og boðið út ta alternativu linjuføringina og harvið fáa tað besta samanberingargrundarlagið millum farleiðirnar báðar.

Viðmerkingarnar niðanfyri eru um alternativu farleiðina. Viðv. Skarvanesleiðini verður víst til viðmerkingarnar í upprunauppskotinum.

**Lægri samlaður kostnaður**

Við loysnini í hesum broytingaruppskotinum, sum vit kalla ta alternativu linjuføringina, verður kostnaðurin 82 mió. kr. lægri enn við loysnini hjá P/F Suðuroyartunlinum við tunli undir Traðarhamar, sum upprunaliga lógaruppskotið í løtuni leggur upp til.

Kostnaðarmetingar fyri alternativu linjuføringina eru gjørdar við somu eindarkostnaðum, sum P/F Suðuroyartunnilin brúkar í sínum útrokningum, og í samanberingini verður við báðum linjuføringum borað upp til Skúvoyar og ikki niður úr Skúvoynni.

Samanberingin sæst niðanfyri:

| **P/F Suðuroyartunnilin** | |
|---|---|
| Skarvanes - Skúvoy (hall 10%) - Sandvík (22,79 km) | 3.760.000.000 |
| Armur upp til Skúvoyar (1552 m og 10% hall) | 210.000.000 |
| Vegur frá Sandoyartunlinum | 73.000.000 |
| Tunnil undir Traðarhamar | 264.000.000 |
| Vegur frá Líðarenda til Djúpadals | 95.000.000 |
| Vegur í Sandvík millum tunnilsmunnar | 12.000.000 |
| Sandvíkartunnil | 339.000.000 |
| Vegur í Hvalba | 62.000.000 |
| | **4.815.000.000** |
| | |
| | |
| **Alternativa linjuføringin** | |
| Sandur - Skúvoy (hall 5,9%) - Sandvík (24,76 km) | 4.085.019.746 |
| Armur upp til Skúvoyar (1620 m og 5,9% hall) | 219.000.000 |
| Vegaføring á Sandoy | 16.000.000 |
| Vegur í Sandvík millum tunnilsmunnar | 12.000.000 |
| Sandvíkartunnil | 339.000.000 |
| Vegur í Hvalba | 62.000.000 |
| | **4.733.019.746** |
| | |
| Munur | 81.980.254 |

Hædd eigur at verða tikin fyri, at tunnilin undir Traðarhamar í lógaruppskotinum bert er leysliga orðaður, og at ábendingar longu eru um, m.a. frá orðaskiftinum til 1. viðgerð, at hann fer at verða longdur. Sambært Tunnilsfelagnum verður eykakostnaðurin av hesum á leið 70 mió. kr.

Somuleiðis hevur teinurin hjá P/F Suðuroyartunlinum upp í Skúvoynna eitt hall uppá heili 10%. Tað er sera ivasamt, um ein so brattur vegur yvirhøvur verður góðkendur, og tí verður helst neyðugt at leingja teinin fyri at fáa hallið niður. Sambært Norconsult verður eykakostnaðurin av hesum á leið 210 mió. kr.

Samanberingin sær tá soleiðis út:

| | |
|---|---|
| **P/F Suðuroyartunnilin** | |
| Skarvanes - Skúvoy (hall 10%) - Sandvík (22,79 km) | 3.760.000.000 |
| Armur upp til Skúvoyar (1552 m og 10% hall) | 210.000.000 |
| Vegur frá Sandoyartunlinum | 73.000.000 |
| Tunnil undir Traðarhamar | 264.000.000 |
| Vegur frá Líðarenda til Djúpadals | 95.000.000 |
| Vegur í Sandvík millum tunnilsmunnar | 12.000.000 |
| Sandvíkartunnil | 339.000.000 |
| Vegur í Hvalba | 62.000.000 |
| | **4.815.000.000** |
| Minka hallið á Skúvoyararmi (smrt. Norconsult) | 210.000.000 |
| Leingja tunnil undir Traðarhamar | 70.000.000 |
| | **5.095.000.000** |
| | |
| **Alternativa linjuføringin** | |
| Sandur - Skúvoy (hall 5,9%) - Sandvík (24,76 km) | 4.085.019.746 |
| Armur upp til Skúvoyar (1620 m og 5,9% hall) | 219.000.000 |
| Vegaføring á Sandoy | 16.000.000 |
| Vegur í Sandvík millum tunnilsmunnar | 12.000.000 |
| Sandvíkartunnil | 339.000.000 |
| Vegur í Hvalba | 62.000.000 |
| | **4.733.019.746** |
| | |
| Munur | 361.980.254 |

Alternativa linjuføringin er sostatt millum 82 og 362 mió. bíligari enn loysnin hjá P/F Suðuroyartunlinum.

**Betri kost nytta**

Í heyst kostaði alternativa linjuføringin nakað meir enn Skarvanesleiðin. Kortini var nútíðarnyttuvirðið á alternativu linjuføringini longu tá betri enn á Skarvanesleiðini. Síðani eru broytingar gjørdar í uppskotinum hjá P/F Suðuroyartunlinum, so at Skarvanesleiðin nú er vorðin dýrari enn alternativa leiðin. Munurin á nútíðarnyttuvirðinum er sostatt bara hækkaður; til fyrimuns fyri alternativu linjuføringina.

**Styttri farleið**

Alternativa farleiðin er styttri enn tann í upprunauppskotinum og verður koyritíðin millum Suðuroynna og meginøkið mett at verða 5 minuttir styttri (3,4 km). Við mettu ferðsluni (1.400 bilar) svarar munurin til 25 ársverk um árið. Verður farleiðin løgd upp á Traðarhamar, verður munurin næstan dupult so stórur og samfelagsmissurin verður samsvarandi størri. Eisini er teinurin undir havbotni styttri enn í upprunauppskotinum (17,2 km ímóti 17,6 km).

**Lægri vegaføring**

Alternativa farleiðin kemur í mesta lagi upp í 20 metra hædd og fer sostatt ikki upp í hæddirnar eins og tann í upprunauppskotinum, ið kemur upp í 110 metra hædd og sannlíkt verður meira darvað av illveðri, sjóroki, hálku og kava. Og verður farleiðin løgd upp á Traðarhamar, fer leiðin til Suðuroyar at liggja í 200 metra hædd; í sama øki sum Brekkan Stóra, ið føroyingar allir kenna frá kava-, hálku- og illveðursávaringum í útvarpinum.

**Minni hæddarmunur**

Alternativa farleiðin gongur niður á 170 metra dýpi og upp í 20 metra hædd (pluss 20 metrar upp og niður millum Skúvoy og Sand), meðan leiðin í upprunauppskotinum gongur niður á 180 metra dýpi og upp í 110 metrar. Hæddarmunurin ímillum leiðirnar báðar er sostatt 80 metrar. Við mettu ferðsluni uppá 1.400 bilar um samdøgrið, svarar hetta til, at 127 bilar um samdøgrið koyra óneyðugt úr fjøruni og  niðan á Slættaratind. Verður farleiðin løgd upp á Traðarhamar, verður hæddarmunurin meir enn dupult so stórur, svarandi til 270 bilar um samdøgrið niðan á Slættaratind. Hetta eru óneyðugir hæddarmetrar, ið kosta nógva tíð, orku, útlát og pengar.

**Tilbúgving**

Við alternativu linjuføringini fer tilbúgvingin (brandstøðin), ið sannlíkt er neyðug í norðara enda av Suðuroyartunlinum, at liggja í Sands kommunu, heldur enn í Húsavíkar kommunu, og hendan tilbúgving kann harvið við fyrimuni fevna um bæði Sandoyar- og Suðuroyartunnilin.  Harumframt er Traðardalur munandi tættari við Landssjúkrahúsið og við Tórshavnar kommunu og landsins største og best útgjørda sløkkilið enn Djúpidalur. Teinurin frá Traðardali til Djúpadals tekur 6 min. at koyra, um ferðin er 80 km/t.

**Íbindingin í Skúvoynna**

Íbindingin í Skúvoynna skal vera partur av útboðnum av Suðuroyartunlinum. Og borast skal upp í Skúvoy og altso ikki niður úr Skúvoy.

Tunnilsfelagið hevur áður ført fram, at boring úr Skúvoy er ein fortreyt fyri alternativu linjuføringini. Hesi niðurstøðu ivaðist Landsverk í og metti tvørturímóti, at tað ber til at bora av Sandi til Skúvoyar (Úr hoyringarskrivi frá Landsverki 14. november 2025):

> Ein niðurstøða hjá tunnilsfelagnum er, at linjan úr Traðardali ikki ber til, uttan at bora verður úr Skúgvoy, tí hon verður ov long at útlufta. Landsverk loyvir sær at ivast í hesi niðurstøðu, tí linjan millum Sand og Skúgvoy er styttri enn hvat Nordconsult metir vera ráðiligt fyri at fáa nøktandi útlufting. Landsverk metir, at tað ber til at bora frá Sandi til Skúgvoyar, og útlufta restina av tunnilsgerðini haðani.

Og Norconsult, ráðgevin hjá P/F Suðuroyartunlinum, hevur nýliga váttað, at til ber at ventilera upp til 13 kilometrar. Strekkið av Sandi til Skúvoyar er 10,15 kilometrar. Sostatt váttar Norconsult óbeinleiðis, at tað eisini ber til at bora upp í Skúvoy og ikki bara niður úr Skúvoy við alternativu linjuføringini. Hetta hevur verkfrøðingurin hjá P/F Suðuroyartunlinum eisini váttað fyri Fíggjarnevndini.

**Ein góð leið upp í Skúvoynna, sum økir trygdina í samlaðu loysnini**

Í alternativu linjuføringini er vegurin frá Suðuroyartunlinum og upp í Skúvoynna 1,6 km til longdar og hallið er 5,9%, sum er sama hall sum í Norðoyatunlinum. Hetta er sostatt ein góður vegur, sum kann brúkast til vanliga ferðslu. Hesin tunnilsteinur økir samstundis um trygdina í samlaðu loysnini við tað, at til ber at ventilera í Skúvoy, umframt at vegurin er ein góð rýmingarleið. Atkoman til Skúvoynna kann tálmast við ferðsluljósum.

Í upprunauppskotinum hjá P/F Suðuroyartunlinum er talan um ein sokallaðan "atkomuveg" til Skúvoyar, har hallið er 10%, og vandin fyri eldi sostatt munandi størri. Tað er tí ivasamt, um hesin "atkomuvegur" upp í Skúvoynna, um hann yvirhøvur verður góðkendur, er ein fyrimunur ella ein vansi fyri trygdina í samlaðu loysinini, hóast hann kanska kann brúkast sum rýmingarleið. Í tilgongdini er fleiri ferðir ført fram, at "atkomuvegurin" ikki er ætlaður til vanliga ferðslu, men til tænastuakfør og bara til fastbúgvandi.

**Undirstøðukervið á Sandi samanborið við í Djúpadali**

Undirstøðukervið, so sum vegir, el- og vatnveitingar, í Djúpadali er avmarkað og má útbyggjast, áðrenn farast kann í gongd við Skarvanesleiðina. Á Sandi, hinvegin, har alternativa linjuføringin er ætlað at byrja, er góður vegur og lætt at sleppa til og frá við tilfari, við amboðum og við maskinum, eins og el- og vatnveitingar í økinum eru fyrstafloks. Tí er skjótari og meira ómaksleyst at sleppa í gongd við alternativu linjuføringina.

Á myndunum niðanfyri sæst, hvar portalurin og byggiplássið eru ætlað at liggja, og hvussu ætlanin er at beina frárensl út á streymasjógv.






**Bíligari el-kaðal til Suðuroyar**

SEV hevur ætlanir um at knýta el-netið í Suðuroynni upp í meginøkið, og ein slíkur el-kaðal eigur sjálvandi at verða lagdur í Suðuroyartunnilin. Háspenningslinjur eru lagdar til Sands, men ikki til Skarvanes. Tí kostar tað 15 mió. kr. meira at leggja el-kaðal til Suðuroyar umvegis Skarvanes samanborið við av Sandi.

**Grótið**

Meðan P/F Suðuroyartunnilin ætlar at leggja grótið úr norðara parti av undirsjóvartunlinum í lendið við tunnilsmunnan á Skarvanesi, verður skotið upp, at grótið frá alternativu linjuføringini verður koyrt beinleiðis til Skopunar og/ella Gomlurætt, har tað í samstarvi við kommunurnar kann leggjast út til ídnaðarøkir.

Tað er nevniliga ikki so langt at koyra av Sandi, og mett verður, at kostnaðurin av at flyta grótið og leggja tað út til ídnaðarøkir áðurnevndu støð er uml. 45 mió. kr. Tá er t.d talan um ídnaðarøkir í Skopun og á Gomlurætt, ið eru ávikavist 65.000 og 50.000 fermetrar til støddar, ella tilsaman 115.000 fermetrar. Við dagsins prísum á ídnaðarøkjum í Streymoynni hava hesi økir eitt søluvirði á góðar 170 mió. kr. Harvið er nettovirðið á grótinum úr norðara parti av undirsjóvartunlinum knappar 130 mió. kr.

Í Suðuroynni hevur Tvøroyrar kommuna boðið sær til at taka alt grótið, ið kemur út í sunnara enda av undirsjóvartunlinum. Sum skilst ætlar kommunan at brúka grótið til at gera ídnaðarøki við Drelnes. Somu fyrimunir eru her sum norðanfyri.

Trýstið á náttúruna í Føroyum minkar yvirskipað av at fáa nýggj ídnaðarøkir við úfylling.

**Óneyðug náttúruinntriv**

Alternativa linjuføringin eirir umhvørvinum við Lítlavatn, Stóravatn, Djúpadal og Sands

bygd. Verður valt at bora úr Skúvoy er talan um fyribils og ikki varandi ávirkan har. Og verður valt at bora til Skúvoyar heldur enn úr Skúvoy, verður Skúvoyggin eisini lítið ávirkað við alternativu linjuføringini.

Harumframt eigur at verða kannað, um til ber at gera ábøtur í Hvalba, so eisini Hvalbiar bygd verður órógvað minst møguligt, og bøurin har mest møguligt verður varðveittur.

**Á Løgtingi, 25. februar 2026**

| | | |
|---|---|---|
| Erling Eidesgaard | Magnus Rasmussen | Árni Skaale |
| Frimodt Rasmussen | Liljan Weihe | Johan Dahl |